Fylgiskjal 44

**Kristjan Árnason**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Kira Hendriksdóttir |
| **Sendt:** | 21. januar 2020 21:54 |
| **Til:** | Kira Hendriksdóttir |
| **Emne:** | Lógaruppskot til ummælis |
| **Vedhæftede filer:** | image005.wmz |

**Fra:** Elkin Klettheyggj <Elkin.Klettheyggj@krfo.dk>
**Sendt:** 21. januar 2020 11:13
**Til:** Heri Petersen <heri.petersen@amr.fo>
**Cc:** Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>
**Emne:** SV: Lógaruppskot til ummælis

Hey Heri

Viðvíkjandi veitingini sambært § 12, so hava vit ongar viðmerkingar til, at hon verður broytt til 7%.
Hinvegin halda vit, at tað gevur lítla meining, at hava tvær ymiskar upphæddir, tí arbeiðið verður tillaga tí innsetta og um viðkomandi slett ikki fær arbeitt, so fær hann sjúkrapening í staðin fyri arbeiðspening.
Samstundis vildi hetta verði umsitingarliga tungt.
Vit viðmæla tí, at man bert hevur eina upphædd.

Viðvíkjandi bústaðarútreiðslum sambært § 18, so undrast vit yvir hesa broytingina, tí ein bústaður er altíð av alstórum týdningi fyri sosialu støðuna.
Í samband við leyslatingina og fyri møguleikan at halda seg frá kriminaliteti eftir avsoning, er ein støðugur bústaður av alstórum týdningi.
Samstundis eru bústaðarviðurskiftini í Føroym so ring, at um man sum innsettur missir bústaðin vegna avsoning, so er sera trupult at fáa annan bústað og harvið er vandin fyri nýggjum og verri kriminaliteti alstórur.
Vit mæla tí til, at henda broyting ikki verður framd.

Vinarliga


*Elkin Klettheyggj*
*Enhedschef hos Kriminalforsorgen på Færøerne*

KRIMINAL FORSORGEN
Institution Københavns Omegn, Bornholm og Færøerne
Færøerne
100 Tórshavn
Tlf.: +298 663800
www.kriminalforsorgen.dk


**Fra:** Heri Petersen <heri.petersen@amr.fo>
**Sendt:** 17. januar 2020 15:39
**Til:** Elkin Klettheyggj <Elkin.Klettheyggj@krfo.dk>
**Cc:** Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>
**Emne:** Lógaruppskot til ummælis
**Prioritet:** Høj

Góða Elkin

Sum eg nevndi fyri tær í telefonini, so eru framdar nakrar broytingar í vælferðarlógini (í mun til uppskotið sum var lagt fyri Løgtingið seinasta vár). Uppskotið varð sent til ummælis av nýggjum, men eitt innanhýsis mistak hevði við sær, at nakrir hoyringspartar duttu burtur ímillum, m.a. Kriminalforsorgin. Vónandi kanst tú halda okkum til góðar.

Sambært avtalu sendi eg tær hervið uppskotið við tí endamáli, at tit kunnu viðmerkja tann partin, sum snýr seg um persónar, sum sita dóm, eru varðahaldsfongslaðir v.m.

Allar lógarásetingarnar, sum eru broyttar, síggjast í viðfesta javnteksti. Fyri ein ordans skyld viðfesti eg eisini alt lógaruppskotið, sum tað er.

Broytingar, sum snúgva seg um persónar, sum Kriminalforsorgin varðar av eru í § 12 (veiting) og § 18 (bústaðarútreiðsla).

**Frágreiðing til § 12** (munin millum lógarásetingina í uppskotinum, sum var lagt fyri Løgtingið seinasta vár og tað, sum nú er broytt, sæst í viðfesta javnteksti)
Veitingin til persón, sum er varðhaldsfongslaður, situr dóm e.a. er ásett í § 12, stk. 1, nr. 7. Hesir persónar gjalda ikki fyri kost og logi í sambandi við dómin, og tey hava rætt til eina veiting, sum er umleið 2.400 kr. um mánaðin. Harumframt kunnu teir arbeiða og harvið vinna sær nakað av lummapeningi. Ásetingin er broytt, so veitingin verður uml. helvtina av upphæddini, sum teir fingu frammanundan. Tó verður tað soleiðis hjá teimum, sum ikki kunnu arbeiða – t.d. vegna sjúku ella vegna avbyrging – at veitingin framhaldandi verður 2.400 kr. um mánaðin.

*Serligu viðmerkingarnar til § 12, stk. 1, nr. 7 eru*: Persónur, sum situr dóm, hevur rætt til eina veiting, sum er 7% av hægstu uppihaldsveiting, um hann annars lýkur krøvini viðvíkjandi ogn o.ø. Um viðkomandi ikki hevur møguleika at arbeiða, er veitingin 13% av hægstu uppihaldsveiting. At tað ikki er møguligt at arbeiða kann t.d. vera orsakað av skaða/sjúku, ella at viðkomandi er avbyrgdur, ella at fyriskipanin er skipað soleiðis, at onki arbeiði er á staðnum.

**Frágreiðing til § 18** (munin millum lógarásetingina í uppskotinum, sum var lagt fyri Løgtingið seinasta vár og tað, sum nú er broytt, sæst í viðfesta javnteksti)
Persónur, sum situr dóm ella er í varðhaldslíknandi fyriskipan sbrt. dómi, kann í ávísum førum fáa fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslu. Ásetingin er herd nakað soleiðis, at fíggjarligt ískoyti einans kann veitast, um tað verður mett at hava týdning fyri sosialu støðuna frameftir, at bústaðurin verður varðveittur.

*Serligu viðmerkingarnar til § 18, stk. 1 eru*: Við heimildini í § 18, stk. 1 kann persónur, sum er varðhaldsfongslaður ella settur í varðhaldslíknandi fyriskipan, situr dóm ella er undir aðrari frælsisskerjandi fyriskipan sambært dómi, fáa ískoyti til rímiligar bústaðarútreiðslur, um so er, at tað verður mett at hava týdning fyri sosialu støðuna frameftir, at varðveitabústaðin í sambandi við útfaringarloyvi ella eftir leyslating. Tað skal hava týdning fyri at fáa persónin resosialiseraðan, at bústaðurin verður varðveittur. Stuðulin er treytaður av, at útreiðslan ikki kann haldast á annan hátt og er treytaður av, at dómurin ikki er longur enn 12 mánaðir.

Tú nevndi, at tú skuldi royna at fáa sent okkum eitt svar týsdagin (21. jan.) seinnapart. Vit høvdu sett stóran prís uppá um hetta kann lata seg gera.

Vinaliga/Sincerely

Heri Petersen
*Fulltrúi/Head of Section*

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304000 • Direct +298 734042
heri.petersen@amr.fo • www.amr.fo • Skype: amr.hep

Når du har kontakt til Kriminalforsorgen, behandler vi dine personoplysninger (dit navn, e-mail og andre oplysninger, som du har sendt). Læs mere om, hvordan Kriminalforsorgen behandler personoplysninger.